## Fleiri hermenn til Afghanistan

Amerikanska herleiðslan umhugsar, um hon skal senda fleiri hermenn afturat til Afghanistan, enn stjórnin longu hevur samtykt. Barack Obama, forseti, hevur gjørt av at senda 21.000 hermenn afturat til Afghanistan, og um ársskiftið verða 68.000 amerikanskir hermenn har. Robert Gates, verjumálaráðharri, sigur við AFP, at amerikanska stjórnin má ansa eftir, tí tað kann elva til misnøgd milloum afghanar, um USA sendir ov nógvar hermenn til landið. Sambært AFP umhugsa amerikanararnir at leggja størri dent á at verja teir afghonsku býirnar heldur enn at jagstra uppreistrarmenn.




## Uppsagnir hjá Finnair

Finska flogfelagið Finnair almannakunngjørdi í morgun, at felagið hevur gjørt av at skerja starvsfólkatalið fyri at skerja rakstrarútreiðslurnar. Avgjørt er at umskipa raksturin frá 1. oktober, og umskipanin fer at hava við sær, at 200 fólk missa síni størv. Finnair almannakunngjørdi í síðstu viku roknskapin fyri annan ársfjórðing. Úrslitið var 26,1 milliónir evrur í halli. Um orsøkina varð sagt, at hallið stóðst av fækkandi ferðafólki og fellandi ferðaseðlaprísum. Fyrr í vikuni boðaði skandinaviska flogfelagið SAS frá enn einari hópuppsøgn.

# Góð ráð til fyrsta skúladag

FYRSTI SKÚLADAGUR

Nú summarið er farið at halla, og børnini gera seg til reiðar at fara á skúlabeinkin aftur, hevur Umhvørvisstovan leitað fram nøkur góð ráð til børn og foreldur teirra, sum kunna nýtast tá skúlataskan skal gerast klár. Kanning sum danska Miljøstyrelsen hevur latið gera vísir, at tað kunnu finnast óheppin evni, so sum PVC, ftalat og tungmetal í eitt nú skúlataskum, pennahúsum og viskileðri. Hesi evni kunna vera skaðilig fyri børnini, samstundis sum hesi evni eisini eru ein umhvørvistrupulleiki, tá tey enda í ruskspannini.

Viskileður kann innihalda bleytt PVC, eins og partar av skúlataskum og pennahúsum kunnu vera klødd við PVC. Bleytt PVC inniheldur sum oftast ftalat, og fleiri ftalat kunnu vera hormonórógvandi.

Tá nýggj skúlataska skal keypast og ymsir lutir til pennahúsi, kanst tú sum foreldur gera títt til, at tíni børn ikki verða útsett fyri skaðiligum evnum.

Umhvørvisstovan hevur tí hesi ráð:

- Keyp skúlalutir, ið bera CE merkið - tað merkir, at tey eru at rokna sum leikur og harvið ikki mugu innihalda tey skaðiligu ftalatini
- Lat ikki børn nýta eldri viskileður, tá hesi kunnu innihalda ftalat.

CE-merkið er á nógvum ymsum vørum. Tað skal eitt nú setast á allar leikur, ið eru ætlaðar børnum í aldrinum 0-14 ár. Merkið er framleiðarans/innflytarans háttur at kunna um, at vøran lýkur tey heilsu- og trygdarkrøv, sum eru í leikareglunum.



*Savnsmynd*


**TVINGSILS-SØLA**

15. september 2009, kl. 09.45 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir ognina matr. nr. 1334, Klaksvík, sum liggur á Kjalarvegur 27, 700 Klaksvík. (AS nr. 2-36/2009)

Talan er um eini sethús í tveimum hæddum.

Húsini eru innrættað soleiðis:

**Stovuhædd:** Inngongd v/trappu uppá, stova, køkur, lítið rúm inn frá køkinum, kamar, kjallararúm/fýrrúm við úthurð, WC.

**1. hædd:** Gongd, lítið goymslurúm, baðiverilsi v/brúsu, WC og vask, stova, kontór, 2 lítil kømur og 1 størri kamar.

Hjallur er bygdur í húsini ájavnt 1. hædd við goymslurúmi niðri undir.

Húsini treingja til ábøtur og viðlíkahald, harundir soleiðis, at veindeygu og tak eru í vánaligum standi

Tvingsilssølan er umbiðin av Jógvan E. Ellefsen, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 4974101), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur, tann 12/8-2009**







## Rætturin til tað góða lívið

TÍÐINDASKRIV

Týsdagin 18. august klokkan 19.30 verður eitt áhguavert tiltak í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tiltakið, sum hevur heitið "Rætturin til tað góða lívið", hevur áður verið hildið í Havn og í Suðuroy, og hevur verið sera væl vitjað. Tað er Bláí Krossur Føroya, sum skipar fyri.

Vit góðtaka, at mamma og pápi kunnu drekka rúsdrekka. Sum samfelag góðtaka vit, at fólk hava frælsi at drekka - og at drekka seg full. Men við hesum verða vit eisini noydd at hava í huga, at nýtsla av rúsdrekka kann taka tað góða lívið frá teimum nærmastu - teimum avvarðandi.

Ætlanin við tiltakinum er at varpa ljós á teir trupulleikar rúsdrekka hevur við sær, ikki fyri misnýtaran, men fyri tey, sum eru um hann - tey avvarðandi. Hvørt tað so er ein maki, børn ella foreldur, so verða tey ávirkað av misnýtsluni hjá misnýtaranum. Hetta kann hava ógvusligar fylgjur á lív teirra.

Tiltakið í Kvinnufelagshúsinum verður skipað sum ein pallborðsfundur. Við pallborðið sita fólk, sum á ymiskan hátt hava merkt, hvat tað er at liva saman við einum rúsmisnýtara. Eisini sita umboð fyri Blákrossheimið við pallborðið.

Tiltakið er alment, og høvi verður eisini at seta spurningar og gera viðmerkingar.